**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski og øðrum fiskasløgum á Landgrunninum. Túrur nr. 1540**
**Tíðarskeið 14 - 21/10 - 2015**

---

**Fólk frá HAV:** Marit Pedersen, Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, Dánjal Steingrund og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og øðrum fiski á føroyska landgrunninum.

**Eyka uppgávur:** Ein botnramma at máta temperatur varð sett út á hydrografi-standardskurði N og V. Ein streymmátari frá hydrografi-standardskurði N varð tikin upp norður-eystur úr Føroyum.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 100 mm meskum í brókaposanum. Vágslemmar. Breitlalongin er 60 m. Rockhopper grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, klokka, skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini mikukvøldið 14/10 kl. 21. Vit byrjaðu at merkja í økinum eystan fyri Nólsoy/Fugloy, men brúktu meginpartin av hósdegnum at sigla eftir eini hydrografiboyu, sum var komin upp frá standardskurði N. Hildu fram at merkja eystanfyri, men fóru 16/10 vestur um Skúvoy, har vit merktu yvir fýra hundrað toskar. Eisini merktu vit 127 toskar og fluttu teir til økið vestan fyri Suðuroy. Har lógu vit 17/10 og merktu 81 toskar. Fóru síðan á Mýlingsgrunnin, har vit merktu knappar fýra hundrað toskar. Eisini har merktu vit nakrar toskar, sum vórðu fluttir til økið suður-vestur úr Mykinesi (Bøin). Á Bønum merktu vit 247 toskar og fluttu 87 toskar haðani til Mýlingsgrunnin. Til seinast merktu vit nakrar toskar á Norðhavinum. Vit vóru á Havnini týsdagin kl. 10.30. Veðrið var gott allan túrin og tí bar til at merkja fisk á nógvum ymsum støðum. Merkingarlistin er vístur í talvuni niðanfyri, merktir vórðu tilsamans 2045 fiskar.

**Fyribilsúrslit:** Sum heild var lítið at fáa av toski, tó at meira var at fáa í økinum vestan fyri Skúvoy. Vit merktu eisini onnur fiskasløg, m.a. hýsu og seið. Vit fingu 85 merktar toskar aftur; av teimum høvdu 80 verið í sjónum í eitt ár ella longri. Vøksturin var 7 cm um árið.

| Øki | Steinbítur | Kalvi | Reyðsprøka | Tunga | Makrelur | Upsi | Hýsa | Toskur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Á Mýlingsgrunni | 0 | 0 | 23 | 4 | 2 | 2 | 11 | 385 |
| Bøurin | 0 | 0 | 2 | 0 | 0 | 57 | 10 | 247 |
| Eystanfyri | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 2 | 12 | 301 |
| Norðhavið | 2 | 0 | 3 | 0 | 0 | 22 | 18 | 150 |
| Vestan fyri Skúvoy | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 419 |
| Vestan fyri Suðuroy | 0 | 0 | 5 | 2 | 7 | 2 | 11 | 81 |
| Skúvoy til Suðuroy | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 127 |
| Mýlingsgrunnur til Bøin | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 50 |
| Bøurin til Mýlingsgrunn | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 87 |
| Íalt | 2 | 1 | 33 | 6 | 9 | 85 | 62 | 1847 |

Tilsamans 2045 fiskar

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Merkilistin var liðugur 21. oktober.

Á Havstovuni 21. oktober 2015
Petur Steingrund – kanningarleiðari.